# Teir yngru skulu hava trý stig

**Bill M. Jacobsen, sum hevur ábyrgdina av U21-landsliðnum, ætlar sær at fáa eins góða úrtøku í hesari undankappingini. Norðurírlandi vitjar í Gundadali í næstu viku, og føroyingarnir skulu hava trý stig**

Uni Holm Johannesen

Bulurin er tann sami. Róaldur Jacobsen. Klæmint Olsen. Erling Jacobsen. Bárður Hansen. Høgni Eysturoy. Rógvi Holm. Karl Løkin. Dánjal á Lakjuni. Kaj Leo í Bartalsstovu. Spælarar, sum hava átt virknan leiklut á sínum liðum í bestu føroysku deildini í ár.

Bill M. Jacobsen og Heðin Askham standa eisini á odda fyri U21-landsliðnum í hesari undankappingini. Tað ræður fremst av øllum um at halda fast um leistin, sum hevur riggað væl seinastu árini.

-Vit ræðast ikki at spæla fótbólt og at spenna álopsbogan. Vit hava skavað eina rúgvu av stigum saman, og eg dugi ikki at síggja, hví tað ikki skal bera til í hesari undankappingini eisini. Tað eru fleiri spælarar, sum hava aldur til U21-landsliðið í ár, sum eisini vóru við seinast. Teir eru búnir í altjóða høpi. Vit eru bjartskygdir og ætla okkum at vinna á Norðurírlandi í næstu viku. Vit skulu samstundis vita, hvat krevst at fáa eitt gott úrslit. Teir ætla sjálvsagt ikki at snáva móti føroyingum, og vit skulu allir gera sítt ítarsta, um vit skulu vinna, sigur Bill M. Jacobsen.

Landsdysturin verður týskvøldið tann 31. mai.

### Klæmint er toppskjútti

Klæmint Olsen er toppskjútti í Vodafonedeildini higartil. Framherjin hevur víst máltev sum fáur í føroysku kappingini. Hann fer ætlandi at eiga virknan leiklut á U21-landsliðnum næstu tvey árini, ásannar Bill M. Jacobsen.

- Hann hevur staðið seg væl, og hann er millum teir elstu. Tað er upplagt, at hann tekur ábyrgd. Klæmint hevur verið sannførandi í ár, og vónandi kann hann skjóta mál á landsliðnum eisini, sigur hann.

Jógvan Isaksen, KÍ, er eisini við í hópinum hesaferð. Klaksvíkingurin hevur verið í landsliðshópinum fyrr, men hansara avrik í verjupartinum hjá KÍ í hesum kappingarárinum hava helst við sær, at hann stendur sterkur í myndini.

- Hann hevur verið ávegis leingi, sigur Bill M. Jacobsen, landsliðsvenjari, við sendingina 3. Hálvleikur.



*- Hann hevur staðið seg væl, og hann er millum teir elstu. Tað er upplagt, at hann tekur ábyrgd, sigur Bill M. Jacobsen um Klæmint Olsen. U21 skal vinna á Norðurírlandi í næstu viku*

**U21-landsliðið:**
Venjarar: Heðin Askham og Bill M. Jacobsen
Næsti dystur: Norðurírland, 31. mei

**Málverjar:**
Kristian Joensen, 07 Vestur
Petur Meinhardt Magnussen, B68

**Verjuleikarar:**
Uni R. Petersen, ÍF
Jan Ellingsgaard, ÍF
Erling Jacobsen, Víkingur
Bárður Hansen, Víkingur
Rógvi E. Nielsen, 07 Vestur
Høgni Eysturoy, B36
Rógvi S. Holm, HB
Jógvan Isaksen, KÍ

**Miðvallarar:**
Karl Løkin, ÍF
Dánjal á Lakjuni, ÍF
Kaj Leo í Bartalsstovu, Víkingur
Róaldur Jacobsen, B36
Hallur Hansson, HB
Heini Vatnsdal, FC Suðuroy
André Olsen, B68
Gunnar Zachariasen, AB
Bogi R. Petersen, Vejle
Rene S. Joensen, Brøndby

**Framherjar:**
Klæmint A. Olsen, NSÍ
Gilli Sørensen, TB



# Jákup Mikkelsen er aftur á landsliðnum

**Jákup Mikkelsen er millum spælararnar, sum Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur sent boð eftir. Atli Danielsen er eisini í hópinum**

Uni Holm Johannesen

Jákup Mikkelsen boðaði upprunaliga frá, at hann gavst sum landsliðsmálverji í 2009. Hann vardi málið tveir landsdystir í fjør, tá Gunnar Nielsen var darvaður av skaða.

Gunnar Nielsen fer ikki at spæla fótbólt næstu mánaðirnar. Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur tískil sent boð eftir Jákup Mikkelsen at vera við í hópinum í landsdystunum móti Slovenia og Estlandi. René Torgarð, EB/Streymur, er eisini við sum málverji.

Atli Danielsen hevur eisini boðað frá, at hann er tøkur aftur sum landsliðsspælari. Miðvallarin er eisini við í hópinum hesaferð.

Viljormur Davidsen og Hallur Hansson eru nýggir í hópinum.

Erling Jacobsen, Víkingur, sum stóð sera væl móti Norðurírlandi á Svangaskarði í fjør, er ikki millum teirra, sum landsliðsvenjarin hevur sent boð eftir.

Føroyar spæla móti Slovenia tann 3. juni. Dysturin móti Estlandi er tann 7. juni.

**A-landsliðið:**
**Venjari:** Brian Kerr
**Næstu dystirnir:** Slovenia, 3. juni, og Estland, 7. juni

**Málverjar:**
Jákup Mikkelsen, ÍF
René Torgarð, EB/Streymur

**Verjuleikarar:**
Eianr Hansen, NSÍ
Atli Gregersen, Víkingur
Jónar Tór Næs, Valur
Pól Jóhannus Justinussen, Valur
Jóhan Troest Davidsen, Aarhus Fremad
Viljormur Davidsen, FC Fyn
Rógvi Baldvinsson, Ålgard Stavanger

**Miðvallarar:**
Fróði Benjaminsen, HB
Hallur Hansson, HB
Bogi Løkin, ÍF
Símun Samuelsen, HB
Daniel Udsen, EB/Streymur
Hjalgrím Elttør, KÍ
Atli Danielsen, FC Roskilde
Súni Olsen, B36

**Framherjar:**
Jóan Símun Edmundsson, Newcastle
Christian Lamhauge Holst, Silkeborg
Arnbjørn T. Hansen, EB/Streymur
Christian R. Mouritsen, Valur